# GERÐABÓK

**Dato: 19. juni 2008 kl. 18.00**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 113/08-131/08**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Kári Árting, fyri Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Halla Samuelsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Bjarti Mohr, ið hevði forfall
Leivur Hansen, ið var burturstaddur

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Ingibjørg Berg

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, KL.18.00**

**119/08** **2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 19. juni 2008:** Tikið til eftirtektar við smávegis broytingum.

**120/08** **2008-0262**

**Leivur Hansen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kári Árting, eru loknar.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt.

- Samtykt varð at viðgera mál nr. 128/08 fyrst.

**121/08** **2005-1183**

**Viðv. matr. nr. 297 - Hansens pakkhús, seinni 'Reinsaríið'/'Vaskaríið' í Tórsgøtu.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt innleiðandi kanningar av bygninginum á matr. nr. 297.

Endamálið við kanningararbeiðinum hevur verið at gera eina støðismeting av bygninginum, ið skal liggja til grund fyri seinri støðutakan til bæði endamálsorðing og arbeiðsgongd fyri eitt hvørt arbeiði við ognina.
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina havt í umbúna at væla um omanfyri nevndu ogn. Ognin er áhugaverd. Her er eitt gamalt pakkhús í søguligu Havnini, og hevur Býarsavnið gjørt viðmerkingar til ætlanina at varðveita bygningin.

## Húsasøga

Við avtøku kongliga handilsins varð m.a. sonevnda "Nýggja Pakkhús" í Vágsbotni (Frederiksvaag) selt á uppboði í 1857.[1] Keyparin var handilshúsið C. F. Siemsen í Hamburg. Skeytið varð lisið sama ár.

Í 1894 seldi keypmaðurin Johannes Hansen, týskur varakonsul, pakkhúsið fyri Siemsen til føroyska handilshúsið M. C. Restorff & Sønner. Konsul Hansen, sum hann kallaðist, var í starvi hjá Siemsen, og seinni keypti hann sjálvur fyritøkuna. Hann myndaði Siemsen í Havn, og harav stavar navnið Hansens pakkhús.

M.C. Restorff & Sønner keypti sum sagt ognina í Vágsbotni. Í skeytinum stendur skrivað ymiskt:

*"...en Pakhusbygning, 2 Etager Høj, ca. 30 Alen lang og 16 Alen bred med den tilsammen hørende Tømmerplads, der med den Grund, hvorpaa Pakhuset staar, udgjør en Firkant [...] og hvoraf en østre Del er særskilt indhegnet og Dyrket som Have..."* [2]
Konsul Hansen tryggjaði sær rættin til urtagarðin eystan fyri Tórsgøtu, nevnt "Hansens Have" - t.e. í dag parkeringsplássið niðan móti Kommunuskúlagarðin og 'Fish & Chips'.

Í 1923 seldi M.C. Restorff & Sønner ognina til Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik, Meiaríið. Keypssáttmálin nevnir ognina "Hansens pakkhús".[3] Tey høvdu eitt nú framleiðslu av sápu í pakkhúsinum.[4] Meiaríið helt fram í bygninginum og hevur havt vaskarí og reinsarí fram til 1970-árini. Maria Olsen hevði Reinsaríið í erva til fyri fáum árum síðani, meðan Postverk Føroya hevði eina pakkadeild í neðra.

Tórshavnar kommuna hevur átt bygningin síðani 1986.

## Kanningar av ognini

Føroya Fornminnissavn hevur áður víst ognini áhuga. Í 1981 gjørdi táverandi savnsarkitekturin Rúni H. Øster eina skitsuuppmáting. Annað er ikki at finna í málinum.

Søgufrøðingurin Ásla Weihe hevur í ritgerð um handilin hjá Ryberg í seinnu helvt 18. aldar við rúgvismiklum skjølum roynt at endurskapa upprunaliga umhvørvið í Vágsbotni. Víst verður til verk Carl Mogensens: Færøske Krønike (1844, seinni útgivið í

---

[1] Yvirlit yvir sølu av ognum einahandilsins, sí Mikkjal Helmsdal: ...verjir fyri Havnarvág (Tórshavn 1994), s. 56-60.
[2] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1894-1895, nr. 29, s. 90.
[3] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1922-1923, nr. 47, s. 755-756.
[4] Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik 1908-1958 (Tórshavn 1958), s. 20.

Tórshavn 1970), at uml. 1820 skal kongligi handilin hava keypt gomlu ognirnar hjá Ryberg *"...hvis Pakhus af 130 alens Længde, var solid bygget af svær pommersk Tømmer, og hvor Handelen, saalænge det stod, stedse havde 1500 à 2000 Tdr. Korn paa Oplag..."*. Víðari vísir Ásla Weihe á eina húsaskrá í 1784, at pakkhúsið var 100 x 15 alin, meðan ein húsaskrá í 1819 sigur, at tá stóð pakkhúsið ikki uppi.

Við støði í 1784-skrásetingini lýsir Ásla Weihe í einum uppskoti, at Vaskaríið, sum vit kenna tað í dag, kann hava verið partur av einum longum pakkhúsi - 100 x 16 alin. T.v.s. at handilin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni (Sosialurin) og norður um verandi Vaskarí hevur verið ein bygningur. Hetta verður undirbygt við skjali hjá amtinum, sum sigur: *"...det for störste Delen kommer til at hvile på Fundamentet af det der forhenstående Pakhus…"* [5]

Kanningin hjá Áslu Weihe av umhvørvinum er virðismikil. Við skjølum hevur hon greinað søguliga Vágsbotnshandilin aftur til 1766.

Tað er sjáldsamt við eini húsaogn uppi í tí nýggjara býnum, har søguligu sporini ganga meira enn tvær øldir aftur til tað gamla samfelagið. Hóast pakkhúsið sambært greining Áslu Weihe av Rybergstíðini varð endurreist í 1831, so er slóðin av virknu tíðini hjá Ryberg, frá tí fyrsta átakinum at hava skipaða framleiðslu av fremmandum vørum í Føroyum, kortini sjónlig.

Pakkhúsið er harnæst ein vitnisburður um virksemið hjá kongliga handlinum og hjá eitt av fyrstu útlendsku handilshúsunum í fríhandilstíðini, Siemsen, og síðani hjá eitt av fyrstu stóru føroysku handilshúsunum, Restorff - tá ið Føroyar gjørdust fiskivinnutjóð. Bygningurin hevur v.ø.o. staðið uppi og verið í brúki í fleiri søgulig skeið.

Eru vit lagalig, so siga vit, at aldurin á pakkhúsinum skjótt er 175 ár. Forsøgulig viðurskifti kunnu vit ikki rættiliga fáa skjalfest, men lítið er at ivast í, at pakkhúsið hevur verið partur av handilsumhvørvinum við Vestaruvág seinast í 1700-talinum.

Á Fornminnissavninum eru fotomyndir av pakkhúsinum við flagtekju og tjøraðum klædningi og myndir av bygninginum á leið soleiðis, sum hann sær út í dag. Hesar eru úr savninum hjá myndatakaranum Absalon Joensen og kunnu helst tíðarfestast til 1920-30-árini og fyri vist frá krígnum 1940-1945.

Býarskipanardeildin hevur gjørt fullfíggjaðar uppmátingar av bygninginum og hevur gjørt frágreiðing um støðismeting, kostnaðarætlan og arbeiðsgongd framm yvir.

Arbeiðið verður mett at skula gerast í stigum.

---

[5] Ásla Weihe: Rybergshandilin og Rybergstíðin í Føroyum (Varðin 58, Tórshavn 1991), s. 26-27.

Skotið verður upp at fara undir at taka verandi klæðing frá fyri at sleppa at umvæla og skifta berandi konstruktiónir, haraftrat skal farast undir at klæða og skifta vindeygu og hurðar, sum hoyrandi til 1. byggistig.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til. at nevndin góðkennir ætlanina, og at nevndin mælir býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at játta kr. 900.000, til hetta arbeiðið, av íløgunum fyri 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. mai 2005:** Einmælt samtykt.

**Lýsing:**
Tilboð eru komin inn, dagfest 10. nov. 2006, til klæðing (mál nr.2006-3262/2), skifta vindeygu og hurðar, grevstrararbeiði rundan um Pakkhúsið og ymisk neyðug HVS-arbeiði.

Lægsta tilboð hevði Húsavarðartænastan áljóðandi kr. 2.096.370,00 + MVG
Projektering og eftirlit verður mett til kr. 300.000,00 + MVG

Óvæntað verður mett til 15% kr. 360.000,00 + MVG
Tilsamans mettur kostnaður uttan MVG kr. 2.760.000,00
Tilsamans mettur kostnaður við 6,25% MVG kr. 2.932.500,00

**Tilmæli:**
Býararkitekturin og tekniski stjórin mæla til, at peningurin kr. 2.932.500,00 til hetta arbeiðið verður fíggjaður við 2 mill. kr. av konto 82, sum so skal tillagast, og við 500.000 kr av íløgum fyri fríðkan av býnum, vísandi til at partur av arbeiðinum er í lendinum kring bygningin. Endaliga varð avsettur peningur í 2006, og eru uml. 500.000 kr eftir av hesum at brúka.

Sostatt verður mælt til at mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum, og fíggja tað eftir ávísta leistinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 500.000,00 av íløgum.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Í álitinum Havnin – livandi, kveikjandi, skapandi – verður skotið upp at gera Tórsgøtu til mentanargøtu í Havn, her eru savnað ymisk mentanartiltøk á einum rímiliga lítlum øki, miðskeiðis í býnum. Í dag er fittur partur av hugskotum at gera Tórsgøtu til mentanargøtu vorðin veruleiki. Niðasti partur av Tórsgøtu er vorðin ein rættur mentanardepil, har vit hava:

Tjóðpall Føroya, Margarinfabrikkina, venjingarhølið hjá Tórshavnar Hornorkestri, Posthúskjallaran. Eisini er samtykt at seta Hansens Pakkhús – betri kent sum Gamla vaskaríið – í stand at nýta til mentanarlig tiltøk.

Fleiri ymisk tiltøk eru staðsett í Tórsgøtu. Eitt tað størsta man vera Asfalt, sum eftir væleydnaða tiltakið í fjør ætlandi veðrur árliga afturvendandi.

Í vár verður fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair hildin í Havn, og partur av teimum tiltøkum, sum tá verða hildin, verða hildin júst í hesum umhvørvinum.

Nú býráðið hevur samtykt at umvæla ognina verður neyðugt at taka støðu til hvat húsini skulu brúkast til í framtíðini.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at kanna møguleikarnar at brúka húsini til spælistað hjá tónleikarum og ungdómslistaskúla, og at leggja málið fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Mentamálanevndin 15. mai 2007:** Nevndin var á staðnum og hugdi eftir húsunum og grannalagnum.

Samtykt at heita á umsitingina um at gera uppskot til heildarætlan fyri reinsaríið, túnið og bygningarnir rundanum.

**Uppískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Útsett.

**Ískoyti:**
Avgjørt at geva fyribils loyvi fram til ólavsøku 2008 at royna niðastu hædd á Hansen´s Pakkhús til tónleikaframførslu. Hetta er góðkent av Brunaumsjón Landsins, sløkkiliðsovastanum hjá Tórshavnar kommunu og tekniska stjóranum. Nakað av trygdarútgerð skal uppsetast og ljós og el-veiting má leggjast inn til bygningin. Hetta er mett at kostað uml. kr. 100.000.

Fyri at koma víðari við fyrireikingunum at gera Hansen´s Pakkhús klárt til varandi nýtslu til almenn endamál, er neyðugt at gera eitt prosjekt um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. í bygningin. Mett er at neyðugt er við uml. kr. 300.000 til at gera skitsuppskot.
**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti mæla kommunustjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til, at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2008 til mentunnarlig endamál, sum eru settar av til Sankta Frans skúla, lutað sundur til á henda hátt:

- at seta upp trygdarútgerð og gera fyribils el-innleggingar v.m. í royndartíðini fram til ólavssøku 2008 – kr. 100.000
- at gera skitsuuppskot til innrætting og nýtslu – kr. 300.000

og at seta samsvarandi upphædd av til Sankta Frans skúla í 2009.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum, tó so at skitsuuppskotið til innrætting og nýtslu eisini umfatar túnið og bygningarnar rundanum í samráð við trivnaðarumsitingina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**122/08** **2008-1362**

**Skriv frá mentamálaráðnum um broyting í bygnaðinum fyri Nólsoyar skúla**.

Í skrivinum verður sagt:

“10. apríl 2008 boðar skúlastýrið fyri Nólsoyar skúla frá, at stýrið einmælt hevur samtykt at broyta bygnaðin fyri Nólsoyar skúla, soleiðis at skúlin frá 1. august 2008 bert hevur næmingar í 1.-7. flokki í tveimum ella trimum flokkum alt eftir barnatalinum.

Sambært § 52, stk. 4 í løgtingslóg um fólkaskúlan ger skúlastýrið uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, og sambært § 47, stk. 6 skal kommunustýrið góðkenna uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, áðrenn hesar sambært § 57, stk. 5 verða endaliga góðkendar av landsstýrismanninum.

Vísandi til omanfyri standandi verður uppskot um broytingar í bygnaðinum fyri Nólsoyar skúla sendar býráðnum til framhaldandi viðgerð.

Biðið verður um at fáa svar hesum viðvíkjandi skjótast gjørligt, tí Mentamálaráðið skal søkja eftir leiðara til Nólsoyar skúla."

Í løtuni ganga 2 næmingar í 8. flokki og 7 næmingar í 9. flokki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta bygnaðin fyri Nólsoyar skúla, soleiðis at skúlin frá 1. august 2008 hevur næmingar frá 1.-7. flokk.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**123/08** **<u>2007-2973 - AB</u>**

**<u>Agenda 21 í Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Agenda 21 er ein arbeiðsætlan fyri burðardyggari menning í 21. øld. Henda arbeiðsætlan var millum annað viðtikin á ST fundinum um umhvørvi og menning, sum var hildin í Brasilia í 1992, har umboð frá umleið 180 londum vóru samlaði.

Kapittul 28 í Agenda 21 heitir á allar heimsins kommunur um at fara í samstarv við íbúgvarnar, felagsskapir og vinnulív á staðnum fyri at menna egnar arbeiðsætlanir um burðardygga menning.

Nevnast kann at Agenda 21 ætlanin, um at seta umhvørivstiltøk í verk, er nevnd bæði í samgonguskjalinum hjá verandi landstýri og í samgonguskjalinum hjá núverandi samgongu í Tórshavnar býráð (sí j. nr. 2007-2973/1 og 2).

Bergmann Finnson frá Agenda Stovuni kemur at greiða frá, hvussu kommunan kann arbeiða við lokal Agenda 21.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at umhvørvisdeildin fær litið upp í hendi at gera ítøkiliga AGENDA 21-ætlan, sum skal eggja borgarunum til at taka virknan lut í arbeiðnum fram móti reinum umhvørvi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. oktober 2007:** Bergmann Finnson kunnaði um

Agenda 21 í Føroyum. Nevndin samtykti at umsitingin letur gera uppskot til arbeiðsseting og uppskot um stýrisbólk at leggja fyri nevndina aftur til næsta regluliga fund.
- Umsitingin leggur fram uppskot til arbeiðssetning og uppskot um bygnað (j.nr. 2007-2973/5).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við arbeiðssetninginum og uppskotinum um bygnað.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. juni 2008:** Samtykt varð at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og at stýrisbólkurin verður mannaður við miðfyrisitingarstjóranum og einum politiskum umboði fyri minnilutan afturat og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt varð at velja serstaka nevnd, sambært §36 í kommunustýrislógini, og vald vórðu Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen.

**124/08** **<u>2008 -3114 - BH</u>**

**<u>Orkuviðurskifti í kommunalum bygningum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eftir evnisdagin við Gjógv um fjarhita tann 4. apríl 2008, umhvørvisráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í døgunum 8.-9. apríl 2008 og Umhvørvisvikuna í døgunum 5. til og við 9.mai 2008, er spurningur settur um farast skal undir at gera eina handlingsætlan fyri framtíðar orkuviðurskifti í kommunalum bygningum – bæði verandi og komandi bygningum.

Fyri at røkka hesi handlingsætlan, kundi arbeitt verið í hesum stigum.

1.stig:
- Skráseting av bygningum hjá Tórshavnar kommunu
- Skráseting av orkunýtsluni í bygningunum
- Útrokning av $CO_2$ útlátinum

2. stig
- Meting av orkurakstri
- Meting av átøkum
- Ráðgeving í alternativum orkuloysnum

3. stig
- Tilmæli um orkuloysnir
- Orða ein kommunalan orku málsetning

Uppgávan er rættiliga umfatandi og tí er neyðugt at seta eksternan ráðgeva at gera arbeiðið í samstarvi við heilsu- og umhvørvisdeildina og húsaumsitingina.

Ein kostnaðarmeting av fyrsta byggistigi sigur, at hetta kemur at kosta umleið kr. 500.000 - 600.000. Húsaumsitingin og heilsu- og umhvørvisdeildin kunnu fíggja hetta av rakstri fyri 2008 við hvør síni helvt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at seta 1. stig í gongd, og at fíggja hetta av rakstri við kr. 300.000 av kto. 12 og kr. 300.000 av kto. 82, og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við eksternan ráðgeva.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at taka undir við heilsu- og unhvørvisnevndini 10. juni 2008.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**125/08** **<u>2006-1340 JL</u>**

**<u>Raðfesting av íløgum í smábátahavnir/smábátapláss</u>**
**<u>Leinging av brimgarðinum á Argjum</u>**

DHI hevur gjørt modelroyndir av bátahyli í Álakeri í sept./okt. 2006.

Í royndunum hevur dentur verið lagdur á, at umframt at tað skal vera kyrt í einari nýggjari bátahavn, skal kyrran í havnini í Tórshavn og í verandi bátahyli á Argjum ikki versna.

Úrslitið av modelroyndini, sum er komið, vísir, at tann rætningurin á brimgarðinum, sum gevur bestu kyrruna i Tórshavnar havn og nýggjum bátahyli í Álakeri, ger tað ókyrrari í verandi bátahyli á Argjum. Fyri at tað ikki skal gerast ókyrrari á Argjum, er neyðugt at leingja verandi brimgarð á Argjum.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 20 m, verður bátahylurin enn kyrrari enn hann er nú, men hetta gevur einki bátapláss.

Um brimgarðurin á Argjum verður longdur við 180 m, verður bátahylurin á Argjum enn kyrrari, enn um hann verður longdur við 20 m, og hetta gevur møguleika fyri 75 nýggjum bátaplássum.

Kostnaðarmeting er gjørd av ymiskum útbyggingrmøguleikum í Tórshavnar kommunu, sum útvega fleiri bátapláss.

| Stað | Bátapláss | Kostnaður |
|---|---|---|
| Álaker | 150 | 25,9 mió |
| Argir leingja brimgarð 20 m | 0 | 3,0 - |
| Argir leingja brimgarð 180 m og gerð av bátaplássum | 75 | 15,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 43 | 6,5 - |
| Gamlarætt hyl inn í lendið | 23 | 4,9 - |
| Signabø, verandi hylur | 50 | 2,7 - |

Í løtuni er tørvurin á bátaplássum nógv størstur í Tórshavn/Argjum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og havnameistarin mæla til at leingja brimgarðin á Argjum við 180 m og at gera pláss fyri 75 bátum at fíggja av konto fyri íløgur í smábátahavnir fyri 2007, 2008 og 2009.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, havnanevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 5. februar 2007:** Samtykt at beina málið til umsitingina til víðari viðgerð.

**Havnanevndin 12. februar 2007:** Ein meiriluti Leivur Hansen, Annika Olsen, Høgni Mikkelsen og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og havnameistaranum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1 mió. av íløgum í smábátahavnir til projektering og fyrireiking.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Fyrsta stigið at leingja brimgarðin á Argjum, og ger av tilhoyrandi bátaplássum og øki annars, er at søkja friðingarmynduleikarnar um loyvi.

Í §21 í løgtingslóg nr. 59 um verju av havumhvørvinum verður m.a. sagt *"Verkætlanir og virksemi á sjónum og fram við strondini, ið ávirka náttúru og umhvørvi munandi, kunnu ikki setast í verk uttan góðkenning frá landstýrismanninum."*

Fyri at tryggja okkum, at vit ikki bróta havumhvørvislógina, eigur landsstýrismaðurin at verða kunnaður um ætlanina, soleiðis at hann kann taka støðu til um útdýpingin kemur undir §21 í havumhvørvislógini.

Næsta stigið í ætlanini er at gera byggiprogram og skitsuuppskot.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
- at gera byggiprogram saman við teknisku umsitingini.
- at gera skitsuprojekt saman við ráðgevara.

**Havnarnevndin 12. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**-**Bygginevndin varð endaliga skipað 30. januar 2008.

Byggiskrá er gjørd, og verður løgd fyri avvarðandi nevndir.

Um tað skal verða møguligt at byrja arbeiðið í 2008, má arbeiðið bjóðast út í seinasta lagi í viku 21, tí tað er ikki møguligt at byggja brimgarðin um veturin.

Útbjóðingin í viku 21 er treytað av:
- at tað ikki er neyðugt at broyta byggisamtyktina.
- at loyvi er komið frá friðingarnevnduni
- at Løgmálaráðið (Innlendismálaráðið) hevur váttað, at útbyggingin kann gerast uttan at árinskanning verður gjørd.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at góðkenna byggiskránna, sum verður send víðari til avvarðandi nevndir.

**Havnarnevndin 18. februar 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við byggiskránni.

**Tekniska nevnd 6. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. mars 2008:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Marin Kathrinu Frýdal, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari viðgerð, fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, treytað av at byggi og býarskipanarnevndin góðkennur byggiskránna, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggiskránni, treytað av:

- at ger av einum brimverjugarði ikki viðførir at neyðugt er at broyta byggisamtyktina.
- at verkætlanin fylgir treytum frá friðingarnevndini
- at ongin bygging byrjar fyrrenn Løgmálaráðið (Innlendismálaráðið) hevur váttað, at útbyggingin kann gerast uttan at árinskanning verður gjørd.
- at ongin bygging byrjar fyrrenn endalig góðkenning av prosjektinum er veitt av byggi- og býarskipanarnevndini

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Dipositiónsuppskot.**
Aftan á at bygginevndin hevur arbeitt við ymiskum møguleikum verður mett, at uppskot 3A er tann besta loysnin, og samsvarðar best við byggiskránna.

Innihaldið í uppskotinum er m.a.:

| | |
|---|---|
| Leinging av verðandi mola: | 180 m |
| Moli út frá landi | 60 m |
| Tal av bátaplássum | 89 stk |
| Bátapláss á landi | 11 stk |

| | |
|---|---|
| Parkeringspláss bilar | 40 stk |
| Bátadráttur | |
| Onki verður tikið av Argjahøvda | |
| Mettur kostnaður | 20 mió. |

Friðingarnevndin hevur ikki enn tikið støðu.
Innlendismálaráðið hevur ikki enn tikið støðu til, um árinskanning skal gerast.
Byggimyndugleikin hevur ikki enn tikið støðu til, um neyðugt er at broyta byggisamtyktina, um bygt verður sambært uppskoti 3A.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
At byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til um byggisamtyktin skal broytast, og um neyðugt at taka stig til at broyta byggisamtyktina.

At árinskanningar verða settar í verk, um hettar verður kravt av Innlendismálaráðnum.

At tikið verður undir við dispositiónsuppskotinum.

At endalig projektering verður sett í verk og arbeiðið boðið út, tá neyðugu loyvini eru fingin til vega.

At málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd, umhvørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Havnarnevndin 19. mai 2008:** Ein meiriluti Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Bjarti Mohr og Jan Christiansen, samtykti at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.
Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, metir ikki, at tað er rætt at fara víðari við málinum, fyrr enn avvarðandi myndugleikar hava tikið støðu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at byggisamtyktin verður broytt til E-øki ið verður lagt til smábáta, frítíðar- og ítróttarvirksemi. Somuleiðis mælir tekniski stjórin til at góðkenna uppskot 3A tekning nr. 01-10.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna skitsuuppskot 3A, tekning nr. 01-10. Somuleiðis verður mælt til, at gjørdar verða árinskanningar sambært galdandi reglum, ið verða at leggja fyri nevndina aftur áðrenn farið verður undir annleggsarbeiði.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. juni 2008:** Nevndin samtykti at takað undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskot 3A tekning nr. 01-10.

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Ein meiriluti, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen og Høgni Mikkelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til støðu sína á havnarnevndarfundi 19. mai 2008.

**Býráðið 19. juni 2008:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutatilmælið frá tekniskunevnd, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Kathrina Frýdal

**126/08** **2006-1204 - KF**

**Serstøk byggisamtykt fyri Stórutjørn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Í sambandi við verkætlanina fyri Stórutjørn, er gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið.

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu fylgjuskjølum og er partur av matr. nr. 139a, 135ed, 135a og 1 æf, Hoyvík, (skal møguliga broytast í sambandi við matrikulering) og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðar-, vinnu-, stovnsbygging og bygging til frítíðar og ítróttarendamál.

Størsti partur av økinum, sum serstaka byggisamtyktin umfatar, har bústaðar-, vinnu-, stovnsbygging verður skipað, liggur í A3 øki í 3. grundumráði í Almennu

byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt, ið samsvarar við umhvørvisflokking í Tórshavnar kommunu.

Restin av økinum, sum serstaka byggisamtyktin umfatar, har bygging til mentanar-, frítíðar- og ítráttarendamál verður skipað, liggur í liggur í D2 øki í 3. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Samlaða økið sum serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn umfatar verður sundurbýtt í 7 eindir.

Eindin I, Vinnuøki
Eindin skal nýtast til miðstaðaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta.

Eindin II, Vinnuøki
Eindin skal nýtast til miðstaðaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta.

Eindin III, Bústaðarbygging
Eindirnar skulu nýtast til bústaðarbygging og bygd mugu einans verða raðhús, íbúðarbygningar ella teimum líkir bústaðir

Eindin IV, Bústaðarbygging
Eindirnar skulu nýtast til bústaðarbygging og bygd mugu einans verða íbúðarbygningar ella teimum líkir bústaðir

Eindin V, Bústaðarbygging
Eindirnar skulu nýtast til bústaðarbygging og bygd mugu einans verða íbúðarbygningar ella teimum líkir bústaðir

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2007:**
Ein meiriluti: Elin Lindenskov, Leivur Hansen, Bjarti Mohr og Sjúrður Olsen samtyktu at taka undir við tilmælinum, við hesum broytingum í uppskotinum til serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn dagfest 20. juni 2007:

At fyri § 7, stk. 4, verður punkt e) strikað og orðingin í punkt d) verður: Á vegastrekkinum h-f kann nýtslan í veghædd verða til handlar, smærri vinnuvirki og

stovnar, ið náttúrliga hoyra bústaðarøkinum til, og sum fylgja umhvørvisflokkum 1 ella 2 sambært góðkendari umhvørvisflokking fyri vinnuvirkir í Tórshavnar kommunu. (Fylgiskjal 1).

At fyri § 7, stk. 1, litra b) hædd á 40 m verður broytt til 49 m.

Ein minniluti: Hildur Eyðunsdóttir tekur støðu í býráðnum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen.

**Uppískoyti:**
Málið um serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn er nú viðgjørt av býarskipanarnevndini hjá landinum og latið Innlendismálaráðnum.

Innlendismálaráðið hevur síðani sendt ummælisskrivið hjá býarskipanarnevndini til kommununa til viðmerkingar, j. nr. 2006-1204/11.

Býarskipanarnevndin staðfestir at øll formlig viðurskift viðvíkjandi økisskipan og ásetingum v.m. eru í lagi.

Av tí at verkætlanin er so stór í vævi og ávirkanin á og avleiðingarnar fyri alt samfelagið so víðfevndar, metir býarskipanarnevndin, at hetta átti at verið eitt landsmál.

Býarskipanarnevndin mælir til, at kommunalu myndugleikarnir gera eina neyva samfelagsliga og búskaparliga árinskanning. Eina útgreining av virknaðinum av at henda stóra verkætlan verður framd í verki, sum eftirfylgjandi verður viðgjørd av lokalum myndugleikum og møguliga landsmyndugleikum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Kunnað var um málið.

**Uppískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn er nú komin aftur frá Løgmálaráðnum, har hon partvís er góðkend við nøkrum viðmerkingum.

Løgmálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini og hevur valt fyribils bert at góðkenna 1. byggistig í byggisamtyktini soleiðis, at Yvirfriðingarnevndin fær skrásett fornminni, flora og fauna í eftirverandi parti av økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, áðrenn samlaða byggisamtyktin verður endaliga góðkend.

Løgmálaráðið heitir staðiliga á kommununa um at gera tær samfelagsligu og búskaparligu árinskanningarnar, sum Býarskipanarnevndin mælir til í sínum áliti. Kommunan eigur at viðgera úrslitini av kanningunum og síðani venda aftur til Løgmálaráðið fyri at fáa viðgjørt endaligu góðkenningina av serstøku byggisamtyktini fyri alt økið.

Umsitingin hevur eisini viðgjørt samlaða málið um Stórutjørn av nýggjum og samlað nakrar av viðmerkingunum, ið deildin hevur haft í verkætlanartíðini, í eitt notat um málið.

Her er vert at leggja til merkis:

- hvussu nógv verkætlanin er vaksin
- at handilsdepilin er broyttur frá Retail til Detail
- møgulig ávirkan á handilslív
- tíðarætlanin kontra Heildarætlan
- bilaferðsla

Býarskipanardeildin er av tí áskoðan, at ein óheft kanning eigur at verða gjørd fyri ætlanina um Stórutjørn fyri at lýsa møgulig árin verkætlanin kann hava á býin viðv. handilslív, bilaferðslu v.m. (sí notat).

Serliga týdningarmikið er at kannað hvussu tað at handilsdepilin verður broyttur frá Retailpark (fáir stórir handlar) til Detail keypssentur kann ávirka miðstaðarbyggingina við Karlamagnusarbreyt og verandi handilslív í t.d. miðbýnum.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn er eingin áseting um hvussu handilsdepilin skal verða, men hetta kann gerast við eini treyt/áseting í skeytinum í sambandi við sølu av lendinum.

Umsøkjarin legði í des. 2007 fram broyttar tekningar av handilsdeplinum sum viðførdu at farið var útum ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini. Somuleiðis fekk hetta broytta uppskotið stóra ávirkan á ferðsluviðurskiftini í økinum, eins og náttúruparturin av høvuðstorginum var skúgvaður útum torgsøkið. Umsitingin metti ikki broytta uppskotið á nakran hátt at betra um umhvørvið í økinum – tvørturímóti – og boðaði umsøkjaranum frá hesum.

Somuleiðis hevur umsøkjarin ikki víst á hvussu ferðslan verður skipað og stýrd í økinum, hóast umsitingin hevur biðið um hetta á fleiri fundum við umsøkjaran. Egnar kanningar sum kommunan hevur latið serfrøðingar gera benda á sera nógva ferðslu bæði inni á økinum og til og frá Sambindingarvegnum, sum krevur skipaða ferðslustýring. Hetta eigur at loysast sum partur av heildini, og tí metir umsitingin at hetta má loysast nøktandi longu í sambandi við ætlaninar fyri 1. byggistig.

Umsitingin hevur síðani havt eina fundarrøð við umsøkjaran við tí fyri eyga at tilevna

útiøkini so tey fáa neyðugar dygdir sum býarrúm, og fyri at koma fram til nøktandi loysnir viðv. ferðsluviðurskiftunum. Úrslitið av hesum var, at ein fullgóð loysn kundi fáast, har verkætlanin varðveitir dygdirnar í útirúmunum, har ferðslan ikki verður leidd tvørturum uttandura torgøkir, har náttúruparturin av høvuðstorginum ikki verður skúgvaður útum torgsøkið og har øll bygging kring høvuðstorgið verður stýrd av umsøkjaranum sjálvum, sum partur av tí bygging, sum er avklárað og ikki avhongur av avtalum við aðrar partar. Samstundis viðførdi henda loysnin, at neyðugt var ikki at broyta serstøku byggisamtyktina.

Umsøkjarin hevur nú kúvent, og hevur sent inn umsøkn um at gera broytingar í serstøku byggisamtyktini kortini, grundað á verkætlanina frá des. 2007. Hetta merkir, at umsøkjarin ikki ynskir at halda seg til tað úrslit sum spurdist burturúr fundarrøðini millum umsøkjaran og umsitingina, eins og onnur týðandi faklig viðurskifti, sosum ferðsluskipan og stýring á økinum, ikki er loyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Kunnað var um málið.

**-Uppískoyti:**
Í skrivi dagf. 14. apríl 2008, søkir Kári Dal-Christiansen vegna P/F SMI Stóratjørn um broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn.

<u>Málsgongdin:</u>
Serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn er eitt úrslit av samarbeiði millum ráðgevarnir hjá P/F Stórutjørn og umsitingina fyri Tórshavnar kommunu. Partarnir høvdu eina fundarrøð, har man bleiv samdur um at gera nakrar justeringar og tillagingar í verkætlanini, sum at enda bleiv til eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Partarnir vóru samdir um, at disponeringin av verkætlanini nú var munandi betur enn upprunaliga.

Serstaka byggisamtyktin bleiv samtykt av býráðnum tann 21. juni 2007.

Síðani fóru ráðgevarnir í gongd við projekteringina, og byrjaðu við handilsmiðstøðini og skipan av torginum norðanfyri handilsmiðstøðina.

Í januar 2008 hevði umsitingin enn eina fundarrøð við ráðgevarnar hjá P/F Stórutjørn, hesuferð í høvuðsheitum um torgið norðanfyri handilsmiðstøðina.

Á fyrsta fundinum framløgdu ráðgevarnir eitt rímuliga væl gjøgnumarbeitt uppskot til eitt torg ímillum handilsmiðstøðina og ítróttar- og frítíðarøki. Men hetta uppskotið helt seg ikki til serstøku byggisamtyktina, sum partarnir í felag vóru komnir fram til.

Býararkitekturin vildi ikki góðtaka, at ráðgevarnir byrja at projektera uttan at fyrihalda seg til serstøku byggisamtyktina, sum teir sjálvir høvdu verið við til at evna til og vildi ikki viðmæla eini broyting av serstøku byggisamyktini við hesum grundarlagnum. Avtalað var so, at ráðgevarnar skuldu gera eitt nýtt uppskot til torg, sum helt seg til

serstøku byggisamtyktina.
Á fundi 5. februar var nýggja uppskotið so lagt fram. Á hesum fundinum luttóku eisini Bárður Nielsen og Kári Dal-Christiansen vegna P/F SMI Stóratjørn Umsitingin hjá TK metti hetta uppskotið at verða minst líka gott sum tað fyrra. Sjálvt um ráðgevarnir ikki vóru heilt samdir, endaði hesin fundurin við, at atbeiðast skuldi víðari sambært serstøku byggisamtyktini.

Í mars fekk TK skriv frá Løgmáláráðnum um at serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn er partvís góðkend við nøkrum viðmerkingum t.d. at vegføringar til og frá økinum skulu framganga av kortskjølunum.

Á einum eftirfylgjandi fundi við Løgmáláráðið var álagt kommununi at kortskjølini, dagf. 19.06.2007, fyri serstøku byggisamtyktina skulu broytast, sum víst var á í skrivinum. Og at serstaka byggisamtyktin síðani skuldi leggjast fram av nýggjum.

Nú er umsókn so komin frá P/F SMI Stóratjørn um broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn.

Teir grundgeva umsóknina um broyting av byggisamtyktini við:

1. við atliti til bilstøðlar, inn- og útkoyringar avvikling av ferðslu til almennar vegir, er nýggja heildarætlanin munandi nærri veruleikanum sambært innleiðandi kanningum hjá ferðsluráðgevanum.

2. Eitt grønt øki ímillum handilsmiðstøðina og bústaðarøki skal verja bústaðarøkið ímóti nógvu ferðsluni kring handilsmiðstøðina.

3. Vestan fyri handilsmiðstøðina, ímóti skrivstovubygningunum eru nú fleiri bilstøðlar, sum starvs- og viðskiftafólk í skrivstovubygningunum partvís kunnu brúka tíðliga á degi. Seinni um dagin er tørvur á øllum bilstøðlunum til handilsmiðstøðina.

4. Torgið norðanfyri handilsmiðstøðina er ætlað at verða eitt torg til eitt lívligt uttandura umhvørvi heldur enn eina fólkatóma fløtu. Úrslitið er munandi betur við tað at breiði vegurin ikki avsker torgið.

Ad. 1) TK hevur ikki fingið dokumentatión fyri at avviklingin av ferðsluni verður betur. Tvørturímóti metir TK at hendan loysnin leggur upp til, at øll ferðslan til og frá handilsmiðstøðini og skrivstovubygningunum skal avviklast ígjøgnum eina til-/frákoyring til almennan veg. TK setir spurnartekin til um hetta er ráðiligt.

Ad. 2) TK metir at hetta ikki kann lata seg gera uttan at byggisamtyktin verður broytt.

Ad. 3) TK dugir ikki at síggja nakra nyttu í at skrivstovubygningarir skulu kunna brúka parkeringsøkið hjá handilsmiðstøðini tíðliga á degnum, tá ið teir sjálvir skulu hava

parkeringspláss til restina av degnum. Tað er ikki nakað sum bendir á, at skrivstovubygningarnir hava meira brúk fyri parkering tíðliga á degnum.

Ad. 4) Torgið er sera stórt, uml. 60x80 m. Hetta svarar til Vaglið frá Bókhandlinum til Býráðssalin og frá ALV kaffstovuni til Klubban. Eitt so stórt øki kann man ikki rokna við at verða lívligt og fult av fólki. Heldur skal man rokna við, at aktivera partar av torginum við eini café, kiosk osv. Og her vil ein vegur, sum sjálvandi skal ferðsludempast, ígjøgnum torgið skapa meira lív. Harafturat metir TK at seinna uppskotið til torg er betur við tað, at tað er avskermað allar vegir við bygningum, sum P/F Stóratjørn sjálvt hevur ávirkan á og skal byggja (handilsmiðstøð, skrivstovubygningur og hotell) ímeðan tað fyrra uppskotið til torg, í stóran mun, liggur upp ímóti ítróttarbyggingini, sum eingin avgerð er tikin um enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir

1. **til** at fyriliggjandi serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn, góðkent í byggi- og býarskipanarnevndini 20. juni 2007 verður løgd alment fram av nýggjum við vegføringum til og frá økinum áteknaðum á kortskjølini.

2. **frá** at ganga umsóknini á møti um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn vísandi til, at mett verður ikki at broytta uppskotið betrar um umhvørvið á økinum, og ger ferðsluviðurskiftini *munandi* verri enn í uppskotinum góðkent í byggi- og býarskipanarnevndini 20. juni 2007.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. mai 2008:**
Ein meiriluti: Bjarti Mohr, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen og Elin Lindenskov samtyktu at taka undir við umsóknini frá P/f SMI Stórutjørn dagf. 14. apríl 2008 og mæla býráðnum at broyta serstøku byggisamtyktina samsvarandi.

Ein minniluti: Jógvan Arge tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**
Vísandi til tilmæli pkt. 2 til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 26. mai 2008, ynskir formaðurin í teknisku nevnd, at nevndin tekur støðu til ferðsluviðurskiftini í sambandi við broyttu byggiætlanina og harav broyttu vegaføringarnar sambært umsókn umsøkjarans.

Tekniska fyrisitingin leggur fram notat frá ráðgevanum hjá kommununi á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at ganga umsóknini á møti um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn vísandi til at broytta ætlanin ger ferðsluviðurskiftini *munandi* verri enn í uppskotinum góðkent í byggi- og býarskipanarnevndini 20. juni 2007 og býráðnum 21.juni 2007.

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Ein meiriluti, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Leivur Hansen og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við samtyktini hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini frá 26. mai 2008.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 19. juni 2008:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá teknisku nevnd, ið var samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Inga Dahl, Sjúrður olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Kathrina Frýdal.

Greiddu ikki atkvøðu: Kári Árting og Beate L. Samuelsen.

**127/08** **<u>2006-1241 KF</u>**

**<u>Keyp/bygging av hølum til umsitingina</u>.**

Stjórnin vísir á, at kommunan og kommunalu uppgávurnar vaksa í stórum og mælir tí til, at fleiri umsitingarhøli verða útvegað sum skjótast.

Mælt verður til at loysa hølistrupulleikan í stigum soleiðis:

1. stig: Kommunan keypir bygningin hjá Petur & Petur á horninum N. Winthersgøtu/Magnus Heinasonargøtu fyri 3,5 mió. kr.
2. stig: Farið verður beinan vegin undir bygging av skrivstovubygningi/býráðssali á ognini, har p-plássið og sølubúðirnar millum Hotell Tórshavn/Sjómansheimið og gl. Posthúsbygningin eru.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum og at fíggja keypið sum útlegg.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Fyrst varð atkvøtt um at at keypa bygningin hjá Petur & Petur á horninum N. Winthersgøtu/Magnus Heinasonargøtu fyri 3,5 mió. kr., ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen
Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð varð atkvøtt um at fara undir kanning av møguleikunum fyri at byggja skrivstovubygning/býráðssal, ið tekur seg væl út á ognini, har p-plássið og sølubúðirnar millum Hotell Tórshavn/Sjómansheimið og gl. Posthúsbygningin, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti**:
Hølisviðurskiftini til umsitingina hjá býráðnum hava verið viðgjørd í samband við ymisk mál. Vísast kann til jr. Nr. 2007-0100 og 2008-0194.

Hesi mál hava gjøgnumgangandi snúð seg um fyribilsloysnir, og úrslitið av hesum er, at fyrisiting kommununar er spjadd ymsastaðni kring miðbýin og at kommunan hevur keypt fleiri smærri bygningar til hesar fyribilsloysnir.

Tað eru fleiri sjónarmið ið tala fyri at fáa savnað fyrisiting kommununar á einum stað:

- Starvsfólkatrivnaðurin verður munandi betur
- Meira rationell og vælvirkandi umsiting
- Meira rationellur rakstur
- Dupultfunktiónir kunnu beinast burtur

Vísandi til innanhýsis tekniskt notat j. nr. 2007-0100/7, eru nevndir 6 ymsir møguleikar fyri loysnum. Í niðurstøðuni verður víst á serliga 2 møguleikar, har tann fyrri er at byggja út á økinum millum Posthúsið og Hotel Tórshavn í 5 hæddum. Við hesi útbygging kunnu útvegast uml. 3000 m2 afturat á hesum økinum, afturat verandi fyrisitingarhølum í Posthúsbygninginum, í Ráðhúsinum og Býráðssalinum. Á henda hátt kunnu útvegast pláss til uml. 120 starvsfólk.

Vísandi til prosjektið um bókasavn á hesum økið, sum varð teknað fyri nøkrum árum síðani, ber til at byggja her uttan at fáa meira skugga á Vaglinum enn í dag.
Hin seinni møguleikin sum í niðurstøðuni í nevnda notatið er nevndur sum ein annar góður møguleiki, sum er at byggja nýtt á grundøkinum beint eystanfyri Norðurlandahúsinum, sum kommunan eigur. Økið er knappliga 10.000 fermetrar til víddar. Økið er sum nú er lagt út sum C2-økið, Opin miðstaðarbygging. Økið er vælegnað, og í grannalagnum eru størri bygningar – t.e. Norðurlandahúsið, Útvarpshúsið

umframt bygningarnir á ítróttarøkinum í Gundadali. Við at broyta økið til t.d. C3-økið ber til at byggja uml. 5000 fermetrar á økinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til, at býráðið tekur avgerð um ein av teim nógvu møguleikum at savna umsitingina á einum stað, sum víst er á í málunum, ið hava verið fyri um hølisviðurskiftini, og at játta kr. 800.000 av íløgum fyri 2008, at fyrireika eina byggi- og kappingarskrá, og at útskriva kapping um at gera prosjekt til eina endaliga loysn.

**Býráðið 30. januar 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Heðin Mortensen, um at beina málið í byggi og býarskipanarnevndini fyri at finna eina hóskandi staðseting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Samtykt at heita á umsitingina at koma við uppskoti til staðseting.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur hugt eftir líknandi verkætlaninum við umsitingarbygningum til kommunur í Danmark. Hesar verkætlanir, ið eru nýggjar, vísa at bruttofermetra tørvurin er frá undir 20 ferm/starvsfólk í Hillerød til umleið 30 ferm/starvsfólk í Middelfart. Viborg 22,5 ferm/starvsfólk. Assens 25 ferm/starvsfólk. Skive 27,5 ferm/starvsfólk. Middelfart hevur 30 ferm/stravsfólk.Tá verður mett at verða gott pláss. Við einum miðalferðmetratali upp á 25 fyri hvørt starvsfólk og við einum mettum starvsfólkatali á 150 fyri Tórshavnar kommunu, verður bruttostøddin 3750 fermetrar.

<u>Økið eystanfyri Norðurlandahúsið:</u>
Umsitingin hevur mett um ymsar staðsetingar – bæði tær sum umrøddar eru í innanhýsis tekniska notatinum j. nr. 2007-0100/7, og aðrir møguleikar. Á hesum grundarlagi er gjørd ein meting av ymsu møguleikunum og ein niðurstøða um eina ávísa staðseting at arbeiða víðari við, sambært samtykt í býráðnum hin 4. feb. 2008.

Við Norðara Ringveg, millum rundkoyringina til Sundsveg og Norðurlandahúsið verður mett at verða góð staðseting. Økið liggur miðskeiðis í býnum og tætt við góðar møguleikar at koma og fara við bussi, bili, súkklu og til gongu. Økið er C2 miðstaðarøki og er tilsamans áleið 10.000 fermetrar.

Í sambandi við 10 ára hátíðarhaldið hjá Norðurlandahúsinum lat kommunan eitt friðingarbræv, sum tryggjar at slættin millum Norðurlandahúsið og Sundsvegin skal liggja sum eitt fríøki, ið kommunan og húsið í felag ráða yvir. Hetta bleiv so tinglisið sum servituttur á ognirnar matr. nr. 1453a, 1409 og 1410d, sum Tórshavnar kommuna og Norðurlandahúsið í felag hava átalurætt til. Hetta ger, at økið ikki kann byggjast, so leingi servitutturin er galdandi.(Journ.nr. 37.6 1993).

**Tilmæli:**

Býarskipanardeildin metir at ognin millum Sundsveg og Norðurlandahúsið er besta staðseting av nýggjum umsitingarbygningi til kommununa.

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at kommunan tekur upp samráðingar við Norðurlandahúsið fyri at avlýsa friðingina av ognini millum Sundsveg og Norðurlandahúsið.

Somuleiðis mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til, at býráðið fyribils játtar kr. 800.000 av íløgum fyri 2008, at fyrireika eina byggi- og kappingarskrá, og at útskriva eina arkitektakapping um at gera prosjekt til eina endaliga loysn, beinanvegin eftir at avtala er gjørd við Norðurlandahúsið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini at staðseta nýggjan umsitingarbygning til kommununa millum Sundsvegin og Norðurlandahúsið og at taka samráðingar upp við Norðurlandahúsið.

**Býráðið 26. mai 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Jógvan Arge um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Í samband við viðgerðina av málinum í býráðnum 30. jan. 2008 og í byggi- og býarskipanarnevndini 4. febr. 2008, varð umsitingin biðin um at koma við einum uppskotið til staðseting, og varð hetta gjørt og lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina 28. apríl 2008. Byggi- og býarskipanarnevndin og fíggjarnevndin tóku einmalt undir við tilmælinum hjá umsitingini ávikavist 28. apríl og 21. mai 2008.

Umsitingin vil eisini vísa á, at helst er rættast at koma við eini rættleiðing til málslýsingina í síni heild. Tað sum talan er um at byggja er ikki ein vanligur umsitingarbygningur burturav, men eitt ráðhús – tað fyrsta av ráðhúsið sum kommunan kemur at byggja beinleiðis til endamálið í høvuðsstaðnum.

Eisini vil umsitingin vísa á, at tað verður framvegis mett at eitt nýtt ráðhús við tí virksemi eitt slíkt fevnir um, vil hóska væl sum granni til Norðurlandahúsið, uttan at nerva tað, og at báðir bygningar tvørturímóti kunnu fáa stórt gagn av at samstarva og at skipa økið kring bygningarnar við parkering og, torgið og øðrum í felag. Byggingin at einum ráðhúsið kann staðsetast móti norðasta partinum av økinum, soleiðis at tað ikki kemur at forða fyri Norðurlandahúsinum.

Eitt annað sum talar fyri hesi staðseting er, at ráðhúsið við hesi staðseting kemur at liggja sum bindilið millum tann innara og eldra býin og tann nýggjasta partin av býnum, uttanfyri ringvegin.

Men um avgerðin í býráðnum 26. mai 2008 skal skiljast sum at býráðið nú ikki vil hava bert eina, men fleiri staðsetingar at velja ímíllum, verður víst til ískoyti og tilmæli til býráðsfundin 30. jan. 2008 og harí umrødda innanhýsis tekniskt notat j. nr. 2007-0100/7.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til, at býráðið tekur avgerð um ein av teim nógvu møguleikum at savna umsitingina á einum stað, sum víst er á í málunum, ið hava verið fyri um hølisviðurskiftini, og at játta kr. 800.000 av íløgum fyri 2008, at fyrireika eina byggi- og kappingarskrá, og at útskriva kapping um at gera prosjekt til eina endaliga loysn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. juni 2008:** Málið er útsett.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Útsett.

**Býráðið 19. juni 2008:** Tikið av skrá.

**128/08** **<u>2004-1691</u>**

**<u>Byggjan av ítróttarbygningi (fimleikahallir) við norðara enda á Tórsvølli</u>**.

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Byggideildin hevur gjørt eitt uppskot til bygging av norðara skýli á Tórsvølli.

Uppskotið er ætlað sum eitt boð uppá, hvussu skýlisbygningur kann kombinerast við privatar og almennar funktiónir upp at einum almennum útirúmi í form av einum torgi. Umráðandi hevur verið, at bygningur og útirúm spæla saman á ein hátt, sum leggur upp til, at aðrar komandi byggingar í økinum styrkja ”torgið”, sum er ætlað at gerast eitt centralt øki í Havnini. Umráðandi hevur tískil verið, at stovuhæddin á allari bygging í økinum hevur eina almenna og eksterna funktión.

Somuleiðis eigur at verða lagt upp til ein byggistíl, sum kann førast aftur til økið og tað sermerktu funktión, sum økið er myndað av og virkar undir.

**Arkitektoniska sniðið**
Arkitektoniska sniðið er grundað á siðvænt stadionsbyggjarí tó soleiðis, at virksemið hjá ÍSF hevur myndað fasaduloysnir og innrætting.

ÍSF er sambandið hjá øllum sersambondunum og tískil myndað av fjølbroyttum virksemi og áhugamálum. Tó er tað eisini soleiðis, at ÍSF stendur sum felagsnevnara hjá øllum – leggur seg sum samlandi karmur um sersambondini.

Hesin metafysiski áskoðanarhátturin er grundarlagið undir fasaduloysnini, har roynt er at leggja áherðslu á konstruktiónir sum rammur um hølisinndeilingina, við øllum sínum skrivstovum til sersambondini og ymiskum funktiónum, sum sleppur at markera seg úti í fasaduni.

Norðara tribuna á Tórsvølli
- til alment endamál er í miðhæddini út til "ítróttartorgið"
- skrivstovuøkið er á 1. hædd
- ítróttarrúm eru í niðastu hædd

**Ásetingar fyri økið:**
Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Økið í Gundadali kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

Býráðið kann áseta í pørtum av grundumráði 1, 2 og 3, at ongar skrivstovur ella líknandi virksemi verður í veghædd.

Fyri at tryggja eitt alment myndað umhvørvi í økinum framyvir verður skotið upp, at ásetingar verða lisnar í skeytini, um at at ítrottar-, resturantións-, handils- og mentuna-virksemi skulu verða í veghædd.

Eisini er ætlanin at arbeiða víðari við at útgreina tey øki/bygningar, ið skulu verða umfatað av hesum reglum.

**Funktión:**
Nýggja norður tribunan á Tórsvølli er ætlað sum ein blandaður skrivstovu- og almennur bygningur.

Ovasta hæddin er til skrivstovur til tey ymisku ÍSF sambondini. Vegginir eru uppbygdir í modulum, og tískil er møguleiki at flyta veggir, um tørvurin á skrivstovuhølum broytist við tíðini.

Miðhæddin er til almenn endamál, sum t.d. ítróttarsavn ella líknandi. Miðhæddin er opin og skal ætlandi virka sum ein týdningarmikil partur av nýggja "ítróttartorginum".

Niðasta hæddin skal rúma hallartengt ítróttarvirksemi. Rúm verður fyri fimleikahøllum og skiftingarhølum. Tey ymisku ítróttarsambondini hava stóran tørv á goymslurúmum, og tískil eru eisini tvey stór goymslurúm í kjallarahæddini.

**Frágreiðing av konstruktión:**
Teir berandi veggirnir í niðastu hæddini eru stoyptir á staðnum. Hetta er orsakað av, at kjallarin fyri ein stóran part er undir jørð, og tískil er trýstið stórt.

Mið- og 1. hæddin er bygd sum ein súlu/bjálka konstruktión. Súlur og bjálkar eru úr beton og berandi í facaduni. Hetta gevur møguleika at facadan verður bygd sum ein løtt, ikki berandi, stál / glas konstruktión.

Dekkið er ætlað sum spenndekk elementir. Spenndekk elementir hava eina stóra spennivídd, og er hetta sera týdningarmikið fyri at fáa eina fleksibla innrætting.

Takið er uppbygt av stálbjálkum, ið skulu bera eina lætta takkonstruktión.

Høvuðsinngongdin til bygningin er kjarnan í bygninginum. Tað er bygt upp við beton elementum og er berandi fyri vind trýstinum, ið er á bygningin.

Tey berandi elementini í bygninginum skulu ikki bert hava eina statiska funktión, men skulu eisini verða dekorativ.

Hetta gevur bygninginum dám av einari lættari konstruktión, ið fellur væl í umhvørvið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000,00 av íløgum til byggiskrá.

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera byggiskrá til bygging av ítróttarbygningi at hýsa m.a. fimleikahallir í norðara enda av Tórsvølli. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisitingina og trivnaðarfyrisitingina.

Í sambandi við byggiskrá fyri bygningin skal hetta gerast í samstarvi við avvarðandi partar og feløg.

Byggiskráin verður at leggja fyri nevndina 19. oktober 2005.

Samtykt at seta kr. 300.000,00 av íløgunum til ger av byggiskrá.

Málið verður lagt fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu**.**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest oktober 2005, sum verður løgd fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Málið varð framlagt av Robert Thomassen, arkitekti, og verður viðgjørt á einum seinni fundi.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2005:** Nevndin viðgjørdi byggiskránna, og sendir hana, smb. Politisku-fyrisitingarligu mannagongdini,

- í byggi- og býarskipanarnevndina at viðgera og góðkenna økið,
- í teknisku nevnd til viðgerð og góðkenning av tekniska partinum og
- í fíggjarnevndina at útvega lendi.

Síðani verður málið lagt fyri mentamálanevndina aftur, at taka støðu til byggiskránna og útbjóðingarhátt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðtaka byggiskránna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna, og at kunna grannarnar.

**Ískoyti:**
Málið verður viðgjørt á fundi í ferðslunevndini 9. november 2005. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli á fundium í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at í byggiskránni fyri fimleika bygging við Tórsvøll, skulu framtíðar ferðslu- og parkeringsviðurskiftini verða frá økinum norðan fyri ÍSF-húsini. Verður bundið í verandi pláss norðan fyri Svimjihøllina, verður atkomuligt til HB- og B36 húsini.

Mælt verður eisini til at eingin almenn ferðsla eigur at verða á økinum við nýggja Torgið. Tó skal sjúkraflutningur og annar bráðfeingis flutningur at verða loyvdur á økinum.

**Tekniska nevnd 23. november 2005:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í arbeiðsbólkin, sum settur varð av mentamálanevndini 14. juni 2005, við ynski um at fáa eina ítøkiliga vegatekniska loysn við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við nevndina fyri Grunnin Tórsvøll, sum er sinnað at leiga nøktandi lendi til ítróttabygging og at gera leiguavtalu.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at gera avtalu við Grunnin Tórsvøll um leigu av neyðugum lendi.

3 Býarverkfrøðingurin hevur á fundi við arbeiðsbólkin umrøtt spurningin um ymsar vegatekniskar loysnir. Greitt verður frá málinum á felagsfundi millum mentamálanevndina og teknisku nevndina.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at viðmæla fyriliggjandi byggiskrá.

Nevndin samtykti eisini, at umsitingin letur gera uppskot til vegatekniska loysn at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta 500.000,- kr. Til projektering.

**Ískoyti**
Í sambandi við at kommunan støðugt arbeiðir við at menna leistin fyri hvussu byggimál hjá kommununi skulu skipast, og havandi í huga, at tað í hesum sambandi, er umráðandi at ymiskar royndir verða gjørdar, so at valmøguleikar í sambandi við útbjóðing av arbeiðum í kommununi, eru sannførandi og so nógvir sum gjørligt, mælir býararkitekturin til at býráðið umhugsar annan leist enn tann, ið er umrøddur í mentamálasamtyktini 8. des. 2005.

Ístaðin fyri at lata gera prosjekt at lata til virkir at bjóða eftir, metir býararkitekturin at nevnda bygging er vælegnað til at lata gera sum heildararbeiðstøku (totalentreprisu), har kommunan við støðið í byggiskránni bjóðar 4- 5 virkjum at gera uppskot til loysn. Tó skal ein slík loysn gerast sum samskipar arbeiðið við Tórshavnar kommunu og Tórsvøll. Hetta eigur tó ikki at vera nøkur forðing, og kann avgreiðast við innleiðandi samskifti, har fortreytirnar fyri snið og funktión verður útgreinaðar beinanvegin.

**Tilmæli:**
Grundað á omanfyrinevnda, mælir býararkitekturin til at arbeiðið at gera fimleikabygging við norðurendan av Tórsvøll, verður framt sum heildararbeiðstøka bjóðað út millum 3 føroysk virkir og 2 útlendsk virkir fyri at tryggja kapping við atliti til eitt fyri Tórshavnar kommunu nøktandi kostnaðarstøðið. Í hesum sambandi eigur kommunan tó at tilskila sær rætt til ikki at taka av nøkrum av tilboðunum, men má tá gera sær greitt at talan er tá um at arbeiði ikki kann bjóðast út aftur í tíðarskeið uppá 6 mðr.

Tilmæli:

**Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum.**

Mentamálanevndin 14. desember 2005**: Samtykt at taka undir við tilmælinum**.

**Ein minniluti Bjarti Mohr mælir til einans at bjóða arbeiðið út millum føroyskar fyritøkur, men tekur annars undir við tilmælinum.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við meiri-lutatilmælinum í mentamálanevndini og at velja Hildur Eyðunsdóttir og Sjúrður Olsen í bygginevndina eftir reglunum í § 36 í kommunulógini.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Magnus Hansen, arkitektur, kunnaði um málið.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at bygginevndin verður biðin um at útvega tilrættaða byggiskrá, um so er, at nevndin ynskir at broyta verkætlanina í mun til upplýsingarnar um broyttan hølistørv, sum eru fingnar til vega í samskiftinum við m.o. fimleikarfeløgini síðani fyriliggjandi byggiskrá frá oktober 2005. Talan er um eina fermetraøking á uml. 63 %.

Eisini verður mælt til, at málið um staðseting av fimleikarahøll við Tórsvøll verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd saman við heildarætlan fyri Tórsvøll, sum grunnurin fyri Tórsvøll hevur latið býráðnum.

**Mentamálanevndin 4. oktober 2006:** Samtykt at biðja tekniska stjóran og býararkitektin ummæla nýggja uppskotið, dagfest 27. september 2006, til fimleikabygging v.m. við Tórsvøll til næsta fund.

**Mentamálanevndin 29. november 2006:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri og Mikael Viderø, býararkitektur, løgdu fram ummæli – fimleikahøll við Tórsvøll, dagfest 29. november 2006.

Samtykt at kanna møguleikan at byggja fimleikabygning til amboðs- og rútmiskan fimleik á einum øki við Landavegin, sum er avlagt til ítróttarendamál. Eisini samtykt at hesin møguleiki skal viðgerast saman við fimleikafeløgunum, og at atlit skulu takast til altjóða krøv.

**Ískoyti:**
Byggideildin hevur endurskoðað ætlanina um at byggja fimleikabygning við norðara enda av Tórsvølli og gjørt uppskot til nýggja skitsu. Uppskotið er grundað í byggiskránni og leystlig kostnaðarmeting er innanfyri upprunaligu metingina.

Bygginevndin tekur undir við uppskotinum og hevur avgjørt at leggja málið til mentamálanevndina til kunningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gjøgnumføra tilmælið hjá býararkitektinum frá 14. desember 2005.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna byggiskránna fyri fimleikabygging við Tórsvøll.

Víst verður samstundis til býráðssamtykt 15. desember 2005 um útbjóðingarhátt og nevndarval.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. apríl 2007:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 14. november 2007:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Inn komu 2 uppskot. MT Højgaard og Articon/Pihl lótu inn tilfar.

*Prísirnir á uppskotum*
Uppskotið hjá MT Højgaard er áljóðandi kr. 44.986.106,- uttan MVG og ókent

Uppskotið hjá Articon/Pihl er áljóðandi kr. 53.625.000,- uttan MVG og ókent

*Vinnandi uppskotið*
Bygginevndin staðfesti úrskurðin hjá Dómsnevndini. Dómsnevndin metti, at uppskotið hjá MT Højgaard er eitt gott svar uppá ynskini hjá Tórshavnar kommunu til Fimleikabygging, og góð loysn fyri einum framtíðar Tórsvølli og Ítróttartorgið móti Svimjihøllini.

*Fundir við áhugabólkar*

Bygginevndin hevur havt fund við umboð fyri grunnin fyri Tórsvøll og fimleikarafeløgini, har hesi fingu høvi at gera sínar viðmerkingar.

Umboðini fyri fimleikarafeløgini vóru væl nøgd við uppskotið og høvdu einki at finnast at.
Umboðini fyri grunnin fyri Tórsvøll gjørdu millum annað vart við, at spurningurin um goymslupláss til Tórsvøll ikki var loystur í uppskotinum frá MT Højgaard.

Sambært byggiskránni var innteknað økið til goymslu til Tórsvøll í einum Hornabygningi. Hesin hornabygningur og goymsla vóru ikki undir yvirlitinum undir Evni og vídd punkt 4.4, men bert sum diagramm saman við tekningunum.

Um Tórsvøllur skal hava goymslu í hornabygninginum, eigur ein samráðing av fara fram við MT Højgaard.

Umboðini fyri grunnin fyri Tórsvøll vístu eisini á, at ikki er neyðugt við fleiri áskoðaraplássum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin biður um heimild til at loyva umsitingini, at samráðast við MT Højgaard um ein sáttmála til bygging av Fimleikabygningi við Tórsvøll, sum skal taka støði í innkomna uppskotinum, har hædd verður tikin fyri manglum í mun til byggiskránna og viðmerkingum frá grunninum fyri Tórsvøll.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, tó soleiðis at bygginevndini verður heimilað at samráðast saman við umsitingini.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 6. mai 2008:** Útsett.

***Uppískoyti***
Samandráttur av málsgongd síðani seinastu viðger í býráðnum.

- Nov. 2007 Tvey tilboð um bygging koma inn í nov. 2007. MT Højgaard hevur lægsta tilboð áljóðandi 44.986.106,- kr.
- Jan. 2008 Samráðingar byrja við MTH um uppskot við tillagingum.
- Mars 2008 MTH letur inn nýtt uppskot við hornabygningi áljóðandi uml. 6,5 mill. Harafturat eru ymiskar prísásetingar á veitingar í byggingini s.s. innandura- og uttandura tribunir, spegl, elevator, fallveggir v.m.
- Apríl 2008 MTH ger nýtt uppskot við alternativari loysn til tak á fimleikabyggingini. Alternativur hornabygningur á uml. 3 mill. er eisini teknaður.
- Framhaldandi samráðingar við MT-Højgaard um tillagingar av sáttmálanum umframt viðurskifti, ið ikki eru við í upprunatilboðnum, t.d. fallveggur, tribunir innan. Samskifti við fimleikarafeløg at tryggja at høllin lýkur møgulig nýggj krøv til altjóða kappingar.

Bygginevndin mælir til, at man heldur fast um upprunauppskotið frá nov. 2007, men at víðkað tilboðið til eisini at umfata fallveggir millum hallirnar, gólvdekk til grøv og innandurða tribunu.

Harafturat eigur at verða bygdur ein hornabygningur at nýta til goymslurúm hjá Tórsvølli.

Samlaðu útreiðslurnar til fimleikabyggingina verður við hesum:

**Fimleikarahallir**

| | |
|---|---|
| Fimleikabygging tilboð nov. 2007 | kr. 44.986.106,- |
| | |
| Manglar í mun til tilboð: | |
| Fallveggir at uppdeila ymisku rúmini | kr. 660.000,- |
| Gólvdekk til grøv | kr. 800.000,- |
| Tribunir innan | kr. 679.000,- |
| | |
| Tilsamans | kr. 47.125.106,- |
| | |
| Avsetast til ókent 10% | kr. 4.712.511,- |
| Avseta til list 1,5 % | kr. 706.877,- |
| Mvg 6,25 % | kr. 2.811.631,- |
| Projekt, eftirlit, byggileiðsla v.m. | kr. 250.000,- |
| | |
| **Tilsamans við mvg, list og ókendum** | **kr. 55.606.125,-** |

**Hornabygningur**

| | |
|---|---|
| Hornabygningur | kr. 2.930.000,- |
| Avsetast til ókent 10 % | kr. 293.000,- |
| Mvg 6,25 % | kr. 183.125,- |
| | |
| **Tilsamans við mvg og ókendum** | **kr. 3.406.125,-** |

Bygginevndin er av teirri fatan, at kostnaðurin fyri Fimleikabygging eigur at verða sæddur í eini heildarætlan fyri økið í Gundadali og við Tórsvøll.
Kostnaðurin at byggja fimleikabyggingina er sera nógv tengdur at staðsetingini, har neyðugt er at byggja við umleið 7 – 8 metrar høgum stuðlaveggi. Harafturat verður bygningurin fyrireikaður til framtíðarbygging omaná Fimleikabyggingina. Hornabygningurin er til goymslu til Tórsvøll, men eisini fyrireikaður til framtíðarbygging omaná.

Samanumtikið eru stórar útreiðslur tengdar at Fimleikabyggingini, ið bygginevndin metir verða skilagóðar at gera, hóast hesar útreiðslur ikki beinleiðis eru til fimleikarabyggingina. Nevnast kunnu hornabygningurin til Tórsvøll, áskoðarapláss á norðursíðu av Tórsvølli, byggibúgving av grundstykki omaná fimleikarabygningin.

Torført er at seta tøl á hesar íløguútreiðslur, ið annaðhvørt onnur seinni fáa ágóðan av, ella har íløgan kann fella burtur um bygt verður omaná beinanvegin, men bygginevndin hevur biðið um at fáa eina optión í sáttmálan á 3 mánaðir, sum leggur upp fyri at byggjast kann omaná beinanvegin.

**Tilmæli frá bygginevndini**
Bygginevndin mælir til at taka av sáttmálanum við MT Højgaard um fimleikarahøll við Tórsvøll og játta kr. 19 mió av íløgum til ítrott og frítíðarvirksemi í 2008, og kr. 36.606.125 í 2009.

Harafturat mælir bygginevndin til at játta kr. 3.406.125 til hornabygning at nýta til goymslu hjá Tórsvølli av íløgum til ítrott og frítíðarvirksemi í 2009.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini og mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndini til at játta kr. 19 mió av íløgum til ítrott og frítíðarvirksemi í 2008 og kr. 36.606.125 í 2009 til fimleikarabygging við Tórsvøll.

Eisini verður mælt til at taka undir við bygginevndini og mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 3.406.125 til hornabygning at nýta til goymslu hjá Tórsvølli av íløgum til ítrott og frítíðarvirksemi í 2009.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal mæla til at taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen metur seg ikki kunna taka støðu til málið, vísandi til at talan er um eina íløgu á 60 mió. kr. og at eingin íløguætlan fyri komandi árini fyriliggur.

**Býráðið 19. juni 2008:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Kári Árting, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**129/08** **<u>2006-1384 TÌH</u>**

**<u>Hegn- og rørportur á Velbastað</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
**4. mai 2008** áheitan frá A. Brekkstein Velbastaður, um at skipa úthegn frá barnagarðinum sambært hjálagt uppskot. Hetta er sama uppskot, sum var í umbúna á heysti 2006

Nýggju útstykkingarnar á Velbastað krevja at úthegn og rørportur verða skipað øðrvísi enn tey eru í dag.
Nýggja útstykkingin hjá J. Hans Østerø, hevur íbinding í Ervavegin, og verður har neyðugt við rørportri. Ùtstykkjarin átti at verið kravdur eftir hesum í sambandi við útstykkingina.

Hjálagt er uppskot til skipan av hegnum v.m. í samráð við umboð frá gl. bygdaráðnum á Velbastað.

Fleiri fráboðanir vóru um óskil og trupulleikar av seyði á staðnum, tá seyðurin skuldi fara av bønum 14. mai 2006. Hegn- og vatnsýnisnevndin var á staðnum og gjørdi úrskurð. Hesin segði at portur skuldi setast í nevnda stað, og tað skuldi vera aftur alla tíð, inntil onnur nøktandi loysn var.

Gamli garðurin sum stóð á staðnum varð niðurtikin, og frítt hjá seyði at ganga sum hann vildi, og skuldi útstykkjarin tá havt gjørt rørportur.
Bøndurnir og brúkararnir av innangarðslendinum vóru ikki fegnir um at seyðurin gekk á bønum.
Politiið og aktingarskipanin høvdu úr at gera við hesum.

Skotið verður upp at skipa hegnið sum víst á hjáløgdu tekning. T.v.s., at rørportrið hjá LV verður flutt í samráð við Landsverk, og rørportrið við sethúsini hjá A.Brekkstein verður flutt út á Ervavegin, gamla bygdavegin sum víst. Síðani verður stikað niðan á Velbastaðvegin, ið er landsvegur og framvið landsvegnum yvir til nýggja býlingshúsið.

Matr. nr.
50a eigari Føroya Jarðargrunnur, brúkari Torfinn Dalsgarð.
51a eigari Føroya Jarðargrunnur, brúkari Jóhan Petur Brekkstein.
Fíggjarlig binding fyri TK: Uppsetan av stiki og rørportrum mett til uml. 550.000 kr. + 10 % = 605.000 kr
(príshækkingar seinasta árið, síðani 4. ársfj. 2006 – 1. ársfj. 2008 brúkarapríIstalið hækkað 7 stig, brennievni 22%, og lønir í byggivinnuni 18%)

**Tilmæli :**
Tekniski stjórin mælir til:
1. at skipa hegn og portur, sum víst á hjáløgdu tekning frá 29. sept. 2006
2. at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um umskipanina av hegni v.m.
3. at taka upp samráðingar við Landsverk um staðseting av vegristum og onnur teknisk viðurskifti.
4. at gera tekniskt prosjekt til góðkenningar hjá teknisku deild og Landsverk.
5. at játtaðar verða 100.000 av íløgum til at gera tekniskt prosjekt.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at játtaðar verða 100.000 av íløgum til at gera tekniskt prosjekt.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**130/08** **2004-1434 LØGD**

**Fyrspurningur frá felag um møguleikarnar fyri at fremja eina ætlan um at byggja neyst í einum parti av grótbrotinum norðanfyri SEV-verkið á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá umsøkjara um at fáa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið) avlagt til p/f Sundsneystini til neystabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina um eina skipanarætlan fyri økið og lýsing av atkomumøguleikunum og at boða umsøkjaranum frá hesum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin hevur um telefonina havt samband við stovnararnar av p.f. Sundsneystunum og eftirlýst

1) umsókn um at keypa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið)
2) skipanarætlan fyri økið
3) lýsing av atkomumøguleikunum.

ad 1) Beinleiðis umsókn er ikki send kommununi, men teir vísa til teldubræv frá 30. juni 2005.
ad 2) skipanarætlan er ikki latin kommununi, men teir hava eina ávegis skipanarætlan at lata.
ad 3) Sum ad 2.

Kommunan hevur fyri tíð síðani keypt lendið (grótbrotið), matr. nr. 4c, Sunds bygd, fyri kr. 262.250,05, sbrt. skeyti frá 14. juli 2005 við treytum.

Búnaðarstovan upplýsir, at kommunan herumframt hevur rindað eitt sindur meira fyri lendið, síðani tað var keypt fyri tíð síðani.

Herumframt hevur kommunan rindað fyri tinglestur og matrikulering.

Í sambandi við málsviðgerðina verður víst til umfarskriv, dagfest 27. oktober 1961, frá Føroya landsstýri til Tórshavnar kommunu og øll kommunustýrini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til um fíggjarnevndina at leiga sp/f Sundsneyst, matr nr. 4c, Sunds bygd, stødd 30.853 ferm., í 40 ár við rætti til framleingjan og fyri vanligan prís sum óbyggibúgvið havnaøki treytað av loyvi landsstýrisins og treytað av, at bygt verður innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, í prinsippinum, at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr.nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 ferm., til neystabygging og tilhoyrandi virksemi í 50 ár við rætti til framleingjan.

Leigan verður samsvarandi leigu av 3 traðum, t.v.s. kr. 3.000 pr. ár. Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílik bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvi fæst frá landsstýrinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen hevur ynskt málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Steðgað verður við avgreiðsluni av málinum, meðan heilsu & umhvørvisdeildin arbeiðir við at kanna møguleikan fyri økjum til tyrving.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini 13. september 2006.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal metir ikki at málið er búgvið at fara fyri býráðið vísandi til, at samtyktin í byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. juli 2005, enn ikki er fylgd og mælir til at koyra málið aftur í umsitingina.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at taka undir við tilmælinum hjá hjá borgarstjóranum um, í prinsippinum at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr. nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 fermetrar til neystabygging og tilhoyrandi virksemi.

Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílík bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvið fæst frá landsstýrinum.

**Ískoyti:**
Innlendismálaráðið hevur í brævi dagfest 24. september 2007 heimilað Tórshavnar kommunu at leiga Sundsneystini Sp/f matr. nr. 4c, Sundsbygd, í 50 ár.

Mett verður ikki, at ætlanirnar hjá felagnum Sundsneystini Sp/f samsvara við byggisamtyktina fyri økið, og arbeitt verður tí við at broyta byggisamtyktina fyri økið, so hon samsvarar við ætlanirnar at byggja neyst o.a. á økinum.

Økið, talan er um, liggur í umráðispartinum B9, ið *verður lagdur til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur. Herumframt verður økið tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum.*

Ætlanin er at broyta byggisamtyktina fyri økið, so økið kemur at liggja í umráðispartinum E, ið verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi.

Ásetingarnar fyri umráðispart E í 3. grundumráði verða soljóðandi:

*Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og virksemi, sum hevur samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi, bilstøðlar o.t.*

*Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

Støða skal tí takast til fyriliggjandi fyribils leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f, ið er treytaður av, at byggisamtyktin seinni verður broytt og góðkend av Innlendismálaráðnum. Endaligur leigusáttmáli verður gjørdur millum partarnar, tá Innlendismálaráðið hevur góðkent broyttu byggysamtyktina.

**Tilmæli:**
Kommustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at viðmæla fyribils, treytaða leigusáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f og leggja hann fyri býráðið til endaliga góðkenning umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 11. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

Vísandi til ískoytið omanfyri, uppskotið til leigusáttmála j.nr. 2004-1434/62, notat í málinum j.nr. 2004-1434/63 verður fíggjarnevndin biðin um at taka støðu til fyriliggjandi fyribils, treytaða leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at viðmæla treytaða leigusáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f og leggja hann fyri býráðið til endaliga góðkenning umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Mælt verður fíggjarnevndini til at treyta góðkenningina av, at umsøkjarin letur inn nýtslu-/byggiætlan og tíðarætlan fyri byggingina til nevndina til endaliga góðkenning.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, umvegin byggi- og býarskipanarnevndina, til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. mai 2008:** Málið er útsett.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. juli 2005 ynskir formaðurin í teknisku nevnd, at nevndin tekur støðu til atkomuviðurskiftini við íbindingina til landsvegin.

Víst verður til kunngerð nr. 57 um kommunala byggimálsviðgerð, har tað sambært grein 1 verður víst á, '*...at kommunustýri ikki kunnu geva byggiloyvi ella nýtsluloyvi, fyrr enn tað er staðfest, at tað, sum søkt verður um, eisini kann gókennast av øðrum myndugleikum, ið sambært aðrari lóggávu hava heimild at set krøv..*'.

**Tilmæli:**
Eftir sum Landsverk skal góðkenna íbindingina av vegaatkomu frá Sundi í landsveg, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at byggimyndugleikin, í sambandi við viðgerð av hesum máli, ger neyvari ásetingar um nevndu íbinding.

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin leggur fram viðmerkingar til treytaða leigusáttmála á fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. juni 2008:** Nevndin samtykti at tekniski stjórin, kommunustjórin og løgdeildin gjøgnumganga uppskotið til sáttmálan við viðmerkingum at leggja fyri aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen mælir býráðnum til at góðtaka uppskotið til treytaðan leigusáttmála við broytingum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal heldur ikki at málið er klárt til at gera leigusáttmála, vísir til tilmæli til teknisku nevnd 12. juni 2008, og at málið eisini eigur at fara í kaldbaksnevndina.

**Býráðið 19. juni 2008:** Atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvar Arge, Kári Árting, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal og Halla Samuelsen.

**131/08** **2008-0502**

**Viðvíkjandi smíðstovuni í Eysturskúlanum**.

Í sambandi við umvælingarnar á Eysturskúlanum hevur skúlin sent skriv viðvíkjandi smíðstovuni, har sagt verður, at Kvøldskúlin má finna sær onnur hølir til teirra undirvísing í træsmíð. Grundgevingin er, at smíðstovan ikki er nóg væl útgjørd viðvíkjandi útsúgving. Í løtuni eru 9 dreygibenkur í stovuni umframt aðrar maskinur, sum krevja útsúgving.

Tann útsúgving sum er, megnar ikki at nøkta tørvin.

Í sambandi við byggifundarfrágreiðing nr. 8 frá Eysturskúlanum kemur fram, at træsmíðstovan er nøktandi til skúlan, men ikki til Kvøldskúlan og heldur ikki til breytaundirvísing hjá eini møguligari savnaðari 10. floks eind. Onnur høli eru ikki í kommununi, sum kunnu brúkast til hetta endamálið.

Fyri at lúka krøvini við útsúgving er neyðugt at gera ábøtur fyri kr. 750.000,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 750.000,00, av íløgum á trivnaðarøkinum, til spónútsúgving so Kvøldskúlin og 10. flokkur eisini í framtíðini kunnu brúka smíðstovuna. Á íløguætlanini eru 116.685 mió kr. merktar til skúlar og mentan, av hesum 8,5 mió kr. til at útbyggja Sankta Frants skúla. Men við tað at málið dregur út í Yvirfriðingarnevndini vegna formlig viðurskifti viðvíkjandi lendinum, verður øll hendan upphædd væntandi ikki brúkt í 2008.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 6. mai 2008:** Útsett.

**Uppiskoyti:**
Byggideildin hevur endurkannað kostnaðin at gera smíðstovuna.

Uppseting yvir kostnaðin á veiting og uppseting av skilaveggi, stórari útsúgvingarskipan er gjørd við støði í innheintaðum prísum frá arbeiðstakarum og projekterandi. 30.04.08, Hans Dávid Dam, sí málið.

**Tilmæli:**
Vísandi til tilmæli 2. apríl 2008 mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta kr. 1.356.250,00 av íløgum á trivnaðarøkinum á konto 90 av íløgum, sum eru settar av til Sankta Frans skúla í 2008 og at seta samsvarandi upphædd á íløgur til Sankta Frans skúla 2009.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Kári Árting | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |